FELAGIÐ PENINGASTOVNAR

Fíggjarmálaráðið
teldupostur: fmr@fmr.fo

Dagfesting
12. november 2025

Hoyringssvar – uppskot til broytingar í skattalógini

Felagið Peningastovnar hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

1. Í uppskotinum § 1, nr. 3, stendur *«Aftaná § 120* q, stk. 1, 2. pkt, verður sum 3. pkt. sett (…)». Í tilvísingini er *nr. 1* millum *stk.1* og *2. pkt*. burturdottið. Tilvísingin eigur tí av røttum at vera *Aftaná § 120 q stk. 1, nr. 1, 2. pkt. verður sum 3. pkt. sett*. Sama er galdandi í teimum báðu tilvísingunum til ásetingina í nr. 3 í teimum serligu viðmerkingunum..
2. Í serligu viðmerkingunum til nr. 3 stendur *«Ein eginváttan er í hesum sambandi at skilja sum ein fráboðan, sum brúkarin av kryptoognum letur til tann fráboðandi veitaran av kryptotænastum…»* Her kann tað tykjast ógreitt, um tað skal skiljast sum, at *"tá talan er um kryptoognir, so er ein eginváttan at skilja sum… men tað fevnir eisini um eginváttanir, peningastovnar fáa til vega frá sínum kundum…»* ella um skal tað skiljast sum, at tá tað stendur *"eginváttan»* í uppskoti nr. 3, so eru tað einans eginváttanir í sambandi við kryptoognir, sum eru fevndar, og altso ikki eginváttanir, peningastovnar fáa til vega frá sínum kundum.
3. Í uppskotinum § 1, nr. 5, stendur *«Viðvíkjandi pørtum av eginogn, ið ein íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan…».* Vit halda, tað er ógreitt, hvat ein *«íløgueind»* er. Gott hevði verið, um tað í skattalógini átti at verið ein allýsing av, hvat ein *«íløgueind»* er, eins og ein allýsing er av *«íløgueind»* í CRS-kunngerðini.
4. Í uppskotinum § 1, nr. 2 skal "ráða**m**di" ivaleyst vera "ráðandi".

Eru spurningar ella ivamál frætta vit fegin.

Blíðar heilsanir

Jean Djurhuus
formaður